

**PEUGEOT 307 2,0 HDI** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: UR 249 KM: 96.000
Árgangur: 26.03.03 Seinast sýnaður: 26.03.03

Kr. 145.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: KF 365 KM: 98.000
Árgangur: 01.03.00 Seinast sýnaður: 20.02.06

Kr. 108.000,-



**FIAT PALIO STW.** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: LT 129 KM: 185.000
Árgangur: 29.05.98 Seinast sýnaður: 24.09.04

Kr. 33.000,-



**TOYOTA YARIS T-SPORT** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: KH 071 KM: 62.000
Árgangur: 03.10.01 Seinast sýnaður: 03.03.05

Kr. 105.000,-



**NISSAN ALMERA 1,8** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: VK 897 KM: 73.000
Árgangur: 27.06.02 Seinast sýnaður: 01.03.06

Kr. 124.000,-



**TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: TE 104 KM: 64.000
Árgangur: 24.08.00 Seinast sýnaður: 01.06.05

Kr. 89.000,-



**HYUNDAI GALLOPER** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: AR 390 KM: 105.000
Árgangur: 28.05.99

Kr. 110.000,-



**TOYOTA COROLLA VERSO 1,8 VAN** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: LA 068 KM: 4.800
Árgangur: 25.01.06 Seinast sýnaður: 25.01.06

Kr. 168.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SU 919 KM: 57.000
Árgangur: 23.10.02 Seinast sýnaður: 01.12.05

Kr. 135.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: MN 074 KM: 153.000
Árgangur: 14.04.99 Seinast sýnaður: 17.06.04

Kr. 79.000,-

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**

Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.

Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.

Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F




*Bilurin er vorðin vrak. Hann endaði 15-20 metrar frá vegnum. Ein varð syftur úr bilinum, meðan hinir báðir máttu skerast úr bilinum.*

*Mynd: Emily á Reynatrøð*

# Álvarsligt ferðsluóhapp í Leirvík

**Heilt leygarmorgunin rendi ein bilur útav vegnum í Leirvík. Tríggir ungir menn fyrst í 20´unum vóru við. Førarin er allarhelst sovnaður, Lukkutíð var stór fjøra í Leirvík hendan morgunin, tí at annars vóru tveir av teimum uttan iva druknaðir**

FERÐSLUÓHAPP
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Løgreglan visti leygardagin at siga, at eitt álvarsligt ferðsluóhapp var hent í Leirvík. Bilurin rendi útav vegnum millum bensinstøðina og kirkjuna. Klokkan 5.40 koyrdi bilurin av vegnum í Leirvík. Hann kom úr tunnilsmunanum Leirvíksmegin og koyrdi framvið vegnum, sum førir oman til ferjuleguna. Stutt eftir vegin, sum førir til ferjuleguna, er eitt bleytt sving til høgru. Bilurin koyrdi bara beint fram við nógvari ferð, og hann endaði umleið 15 til 20 metrar niðri í fjøruni.

– Orsøkin til óhappið er óviss, men ferðin hevur heilt vist verið ov høg, segði vakthavandi.

### Førarin sovnaði

Pápin hjá førarinum, Randal Nybo, greiddi Sosialinum frá óhugnaligu hendingini:

– Sonurin hevur sagt mær, at hann sovnaði, og kanskaa fóturin er dottin yvir pedalin og sett ferðina upp.

– Lukkutíð var sera stór fjøra hendan morgunin, tí at annars hevði sonurin og annar vinnmaðurin druknað. Bilurin var so langt úti á fjørðinum, at hann hevði verið undir í vatni, um vatnstøðan var vanlig.

– Tann eini var syftur úr bilinum, tá ið hann koyrdi útav. Hinir báðir máttu skerast úr. Fartelefonin hjá manninum, sum varð syftur úr bilinum, datt í sjógvin, og sonurin rakk ikki eftir telefonini. Tann triði hevði mestsum einki battarí eftir á telefonini, men hann fekk ringt til eitt tilvildarligt nummar og sagt frá, hvar teir eru, og hvat var hent, fortelur Randal.

### Eingin autoverja

Sonurin hjá Randal hevur fingið álvarsligan heilaskjálvta, og hann hevur torført við at rakna ordiliga við aftur. hin, sum sat fastur í bilinum fekk einans snuddir, meðan tann triði fekk skaða í miltilin, lunga og hevur brotið eini seks rivjabein.

Bilurin gjørdist vrak, og skaðin á ungu mennirnar kundi lættliga verið álvarsamari.

Randal Nybo fýlist á, at tað ikki verður sett okkurt fyri, tí at tað er eisini hent áður, at bilar koyra útav har. Hann eftirlýsir eina autoverju ella okkurt tílíkt.

– Um veturin hendir tað ofta, at bilar einans glíða av vegnum í hálkuni, tí at har er einki fyri. Tað burdi ikki verið so, at vit bíða inntil onkur doyr, áðrenn vit gera nakað við tað, sigur Randal Nybo.

# Danskt rannsóknarskip verður seinkað til Føroya

**Danska rannsóknarskipið Vædderen verður seinkað eitt sindur til Føroya. Teir skulu í turdokk í Norra fyrst og verða væntandi í Tórshavn tann 16. august, um alt gongur væl**

GRANSKINGARSKIP
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Teir fóru úr Danmark fríggjadagin, men teir skulu fyrst til eina turdokk í Stavanger, tí at tað eru onkrir trupulleikar við skrúðuni.

Kanningarferðin hjá Vædderen verður kallað Galathea 3. Teir fara at sigla jørðina runt og gera vísindarligar royndir. Hesar kanningarferðirnar hava verið gjørdar fyrr av danskarum.

Eftir ætlan verður almennur fyrilestur í Norðurlandahúsinum mikudagin. Granskarar, sum taka lut í rannsóknarferðini hjá Galathea fara at halda fyrilestur. Eisini verður filmur vístur frá Galathea 2 rannsóknarferðini, sum var frá 1950-1952. Hin fyrsta Galathea rannsóknarferðin var longu í 1845-1847.

Umleið 50 toymi av tíðindafólkum og granskarum fara at vera umborð.